FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Lærari í sjúkrarøkt

## Starv á Fróðskaparsetri Føroya

**Tvey tíðaravmarkaði fulltíðarstørv sum lærari í sjúkrarøkt eru leys at søkja á Fróðskaparsetri Føroya (Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya).**

**Starvsøki:**
Størvini fevna millum annað um at leggja til rættis og undirvísa í sjúkrarøkt, vegleiðing í sambandi við uppgávuskriving og verkætlanir. Arbeitt verður í tøttum samstarvi, bæði í toymi, innan samlaða lærarahópin, við kliniska partin av útbúgvingini og við aðrar samstarvspartar.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar, sum hava kandidat- ella masterútbúgving innan sjúkrarøkt, helst innan kliniska sjúkrarøkt, hava fyrimun. Sjúkrarøktarfrøðingar, sum eru ávegis við víðariútbúgving á master ella kandidatstøði, kunnu eisini søkja.

**Umsókn:**
Umsóknarfreistin er 31. mai 2010.

Størvini verða sett frá 15. august 2010. Annað starvið gongur út 31. desember 2010 og hitt starvið 30. juni 2011. Galdandi fyri bæði størvini er, at møguleiki er fyri leingjan av setanini. Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir saman við avriti av próvskjølum, CV og arbeiðsroyndum skulu sendast Fróðskaparsetrinum. Við umsóknunum skal eisini fylgja eitt yvirlit yvir møguliga gransking og avrit av granskingaravrikum í trimum eintøkum.

Ein metingarnevnd verður sett at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda tær til rektaran, Jóan Paula Joensen jopajo@setur.fo ella rektaran á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum, Súsonnu Mortensen susanna.m.mortensen@skulin.fo.

Upplýsingar um virksemið á Fróðskaparsetrinum eru at finna á heimasíðuni: www.setur.fo.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Lærari í sjúkrarøkt

## Starv á Fróðskaparsetri Føroya

**Starv sum lærari í sjúkrarøkt er leyst at søkja á Fróðskaparsetri Føroya (Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya).**

**Starvsøki:**
Starvið fevnir millum annað um at leggja til rættis og undirvísa í sjúkrarøkt, vegleiðing í sambandi við uppgávuskriving og verkætlanir. Arbeitt verður í tøttum samstarvi, bæði í toymi, innan samlaða lærarahópin, við útbúgvingini og við aðrar samstarvspartar. Krøv verða sett til framhaldandi menning av egnum førleikum í undirvísingar- og granskingarhøpi.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar skulu minst hava kandidat- ella masterútbúgving innan sjúkrarøkt. Tað er umráðandi, at viðkomandi sýnir hug og vilja til framhaldandi menning eisini sum granskari. Umsøkjarar, sum hava royndir við undirvísing og vegleiðing, og tey, sum hava granskingarroyndir, hava fyrimun.

**Umsókn:**
Umsóknarfreistin er 31. mai 2010.

Starvið verður sett 15. august 2010. Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir saman við avriti av próvskjølum, CV og arbeiðsroyndum skulu sendast Fróðskaparsetrinum. Við umsóknunum skal eisini fylgja eitt yvirlit yvir møguliga gransking og avrit av granskingaravrikum í trimum eintøkum.

Ein metingarnevnd verður sett at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda tær til rektaran, Jóan Paula Joensen jopajo@setur.fo ella rektaran á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum, Súsonnu Mortensen susanna.m.mortensen@skulin.fo.

Upplýsingar um virksemið á Fróðskaparsetrinum eru at finna á heimasíðuni: www.setur.fo.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

FØROYA LANDFÚTI
POLITIMEISTARIN
Smyrilsvegur 20 · Postboks 3018
FO-110 Tórshavn · Tlf. 35 14 48

# POLITIIÐ YNSKIR AT LEIGA HÚS ELLA ÍBÚÐ

Møblerað hús ella íbúð í Tórshavn ynskist til leigu í tíðarskeiðnum frá 12. juni til og við 27. august 2010 til jurist, ið starvast hjá politinum.

Áhugaðir útleigarar kunnu í seinasta lagi mikudagin 26. mai 2010 venda sær til: politi@politi.fo við tilboðum hesum viðvíkjandi.

**FØROYA LANDFÚTI**
Tórshavn, tann 17. mai 2010
*Karen Marie Olesen*


# 10 persóna bussur








**Fiat Scudo 2,0 JTD**
5 ára gamal. Koyrt 72.000 km.
Í sera góðum standi.
Lagalig fígging.

**Tel. 21 73 00**

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

# KOYRIKORT?

EYSTUROYINGAR

**Nýtt teoriskeið byrjar mikudagin 26. mai 2010 kl. 18:00.**

**Tilmelding hjá:**

| | |
|---|---|
| Jari Lykke | 590500 |
| Mikkjal Hansen | 722578 |
| Hugo Kristiansen | 225225 |




**EYSTUROYAR TEORISKÚLI**

Sosialurin

STILLADS LEIGA
Absolutt bíligast!



GUTTORM MORTENSEN
www.stilladsleiga.com
TELEFON 25 11 60

www.sosialurin.fo

# Másin til sølu

Við hesum verður Strandfaraskipið M/S Másin lýstur til sølu. Freistin at koma við boðum er 18. juni kl 12:00. Lýsingin sæst á www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS